DAGSINS MEINING

Grør so fagurt

Sosialurin verður kallaður bæði eitt og annað millum ár og dag. Vit fegnast altíð um konstruktivar viðmerkingar og fingu vit eina slíka í vikuskftinum. Blaðið varð rópt ein tøðsproyta av Torbjørn Jacobsen fólkatingslimi. Vit kenna øll funktiónina hjá einari tøðsproytu, hon taðar bøin, so grasið í líðum fer at næla. Um Sosialurin er við til at orðaskfti grør kring Føroya land og spírar av konstruktivum kjaki stinga seg upp, tí væl er taðað, so fegnast vit sjálvsagt um tað.

Torbjørn Jacobsen hevur ein trupulleika, og tað er, at hann tosar ov nógv, og hugflogið fer viðhvørt nakað langt hjá honum. Tað var sum at lesa manuskriptið til ein Hollywood film, tá Torbjørn Jacobsen var endurgivin fyri at siga, at heimskapasiteturin Thorvald Stoltenberg skuldi vera trýstur av donsku sendistovuni í Oslo, danska uttanríkisráðnum og so til síðst av Føroya Javnaðarflokki til at lata vera við at hjálpa Norðuratlantsbólkinum. Álvaratos, kann leiðslan í Tjóðveldisflokkinum einki fyritaka sær, uttan tað antin er søguligt ella er partur í einari stórari samansvørjing, har so at siga øll verðin er úti eftir okkum føroyingum?

Tað er pínligt, at man lýsir vítt og breitt við at Stoltenberg skal luttaka í arbeiðnum hjá Norðuratlantsbólkinum, og so "gloymir" at boða føroyingum frá, tá maðurin ikki vildi hóast alt.

Tað er uppaftur meira pínligt, at man heldur enn at viðganga, at man var nakað bráur, roynir at kóka tær heilt stóru konspiratiónsteoriirnar upp við sendistovum, uttanríkisráð o.s.fr. Tað er, útyvir at yvirmeta týdningin av sær sjálvum og Norðuratlantsbólkinum, at gera føroyingum fyri skommum uttanlands, tá okkara fólkavaldu umboð ganga og spreiða undarligar gitingar. Tað er ikki so løgið, um fólk hereftir fara at aftra seg fyri at tosa við Norðuratlantsbólkin fyri at sleppa undan at verða blandað uppi í merkiligum konspiratiónsteorium.

Torbjørn Jacobsen hevur fyrr víst, at hann ikki altíð stendur við sítt orð. Hvør minnist ikki pínligu søguna, har ein bandupptakari mátti á borðið fyri at prógva, at Torbjørn leyg. Er málið um Stoltenberg aftur eitt dømi, har stemmuslúkarin hjá Tjóðveldisflokkinum hevur sagt ov nógv og ikki vil standa við síni orð? Torbjørn Jacobsen skal vera vælkomin at luttaka í orðaskifitnum í blaðnum, einum orðaskifti, sum hann oftani sjálvur er íblásturin ella keldan til. Um maðurin ætlar at nokta at svara spurningum frá blaðfólki í framtíðini verður so hansara søk. Og velur hann heldur sum nú at brúka ella misbrúka aðrar fjølmiðlar, so er tað eisini hansara val. Áhugavert verður at fylgja við, tá og um sami Torbjørn kemur á ting. Har er hann eisini fyrr lopin framav tá sum landsstýrismaður, so spurningurin er, hvussu fer at ganga við at hava tamarhald á mussaskoðinum, tá hart leikar á í tinginum. Og á tingi vita vit verða hvørt einasta orðið bandað. Hetta verður so heilt givið ein krevjandi uppgáva hjá komandi tingformanninum. Livst og spyrst.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Vilja haldast uttan fyri partapolitiskt kjak

Fýra fakfelagsleiðarar svara skrivi frá Heina Holm, valevni hjá Tjóðveldisflokkinum, í Sosialinum dagfest 6. apríl og 9. apríl 2002, har hann nevnir fýra fakfelagsformenn við navni og kallar tey leigisveinar hjá Javnaðarflokkinum

Ingeborg Winther, Gunnleivur Dalsgarð, Carita Bjørklund og Elsa Birgitta P. Petersen

(Av tí at yvirskriftin kom skeivt fyri, prenta vit greinina umaftur).

Heini Holm hevur miskilt, hvørja uppgávu eitt fakfelag hevur. Arbeiðið hjá einum fakfelagsformanni er at standa í fremstu rød og arbeiða við teimum málum á arbeiðsmarknaðinum, sum til eina og hvørja tíð eru uppi í tíðini. Fakfelagsformenn skulu arbeiða fyri sínar limir og verja teirra áhugamál, líka mikið hvørjir flokkar stýra landinum.

Politikararnir hava eisini sítt at forsvara, men teir mugu gera sær greitt og tola, at teir koma at standa mitt í stríðnum. Tað gera teir oftast eisini.

Tað er ikki persónarnir, men málið, viðgerðina og niðurstøðuna hjá politikarunum, tað snýr seg um fyri fakfeløgini.

Ingeborg, Gunnleivur, Carita, Elsa Birgitta og Óli Holm eru persónar, sum eru uppi í tíðini, men tað eru ikki nøvnini, man skal fokusera uppá, men sakina.

Tað er okkara arbeiði at taka lut, gera vart við okkum og fyrst og fremst at verja okkara limir og teirra arbeiðs- og lønarviðurskiftir. Um fakfelagsformenn ikki gera tað, gera teir ikki sítt arbeiði til lítar.

Tað er eyðsæð, at Heini Holm ikki veit, hvat hann tosar um. Tað átti hann at gjørt, áðrenn hann úttalar seg.

Orðið "leigisveinar" er eitt sterkt og negativt løtt orð, og vit halda ikki, at vit fakfelagsformenn í Føroyum eiga at fáa slík orð fest á seg.

Undirritaðu krevja, at vit verða hildin uttan fyri partapolitiskt kjak.

Ansið eftir samgonguflokkunum

Jákup Lamhauge
valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Ynskja vit framhaldandi at liva í einum framkomnum Føroyum, tá velja vit framhaldandi ríkisfelagsskap - sum Sambandsflokkurin vil virka fyri.

Løgtingsvalið hesaferð stendur meira enn nakrantíð áður um valið millum varðveitan av ríkisfelagsskapinum millum Føroyar, Danmark og Grønland, og so hinvegin um valið at slíta Føroyar úr ríkisfelagsskapinum.

Samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava í sínum valuppleggi til Føroya fólki gjørt greitt, at um teir aftur fáa meirilutan í løgtinginum, so verður hildið fram á somu leið sum seinastu fýra árini - nevniliga at slíta øll bond við 600-ára gamla ríkisfelagsskapin.

Stevna sjálvstýrisflokkanna er ikki at taka feil av, og tí er tað so mikið meira umráðandi, at vit føroyingar eru á varðhaldi og leggja forðingar fyri ætlanum teirra. Hendan møguleika hava vit á valdegnum 30. apríl.

Veljarakanningarnar seinastu tíðina hava víst, at stórur meiriluti av føroyingum eru ímóti at slíta við ríkisfelagsskapin, og tað kunnu vit bert fegnast um, men løgtingsvalið hevur ikki verið enn, og tí er umráðandi, at vit halda fast um støðu okkara og ikki bert tað, men at vit hvør í sínum lagi gera sítt til, at valúrslitið verður eins gott og veljarakanningarnar higartil hava víst.

Øll mugu gera sær greitt, at talan er um eitt sera álvarsamt val - tí eru vit fyrst farin úr ríkisfelagsskapinum, so ber ikki til at venda aftur.

Tí verður enn einaferð rópt varskó til føroya fólk - stemmið í við Sambandsflokkinum, flokkinum sum vil tryggja vælferð og trivna í landinum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Inni á Firði í Kollafirði

Heini Olsen

Í Sosialinum 28. mars 2002 skrivar Hans Jákup Simonsen, at hvørki táverandi politikarar ella landsverkfrøðingurin lurtaðu eftir ynskinum hjá einum stórum meiriluta av kollfirðingum, ið vildu hava vegin lagdan oman fyri bygdina.

Eg skal til hetta viðmerkja, at landsverkfrøðingurin júst helt tað vera skilagott eisini at leggja nevnda strekki omanfyri bygda økið inni á Langasandi, og eg kann leggja afturat, at gamla prosjektið frá fyrst í sjeytiárunum øll hesi árini hevur ligið hjá Landsverkfrøðinginum og biða eftir at verða sett á figgjarlógina, soleiðis at haldast kundi fram við vegagerðini til íbinding í gamla landsvegin á leið, har rundingurin nú liggur. Fólkið á Langasandi vildi, sum vera man, hava ein teym oman til virkisøkið har inni, og er hetta vegurin verður koyrt eftir í dag. Peningur var ikki tá játtaður til restina.

Hvørja støðu politikararnir fara at taka, veit eg ikki; men prosejktið liggur klárt – har væntar bert sjálv íbindingin í rundingin, sum ikki tá var komin.

Hetta til valið verða væntandi mong valevnisbrøv líkt hesum, ið nema við føroyska vegakervið, og fyri at fáa tey so skilagóð, sum gjørligt, fari eg hesum at mæla valevnunum til, fyrst at kunna seg hjá Landsverkfrøðinginum, áðrenn tey skriva, soleiðis at brøvini heldur kunnu vísa til, at gomlu prosjektini kring landið bert liggja og biða eftir játtan. AT nevnt tey øll hevði verið lag á manni, men hevði í hesum umfari verið ov rúgvusmikið.

Tað studningsfría samfelagið

Palli Dalsgaard

Seinastu árini hevur nógv verið gjørt burturúr tí, at vit hava fingið eitt studningsfrítt samfelag. Tað er eingin endi á, hvat hendan broyting verður lovprísað, men er hon tað verd? Studningurin, ið var latin til ymisku arbeiðini, serliga á teim smærru bygdunum, skapti nakað av lívið á pláss sunum. Tað var sagt, at nú fáa kommunurnar peng- ar á annan hátt, ið skal verða ein máti, ið er til tað betra, kann verða nakað um tað, men upphæddin er ikki tann sama sum frammanundan.

Sjálvur eri eg ikki førur fyri at greiða frá út í æsir um hesa broyting, tí nú eru nøkur ár síðan eg fór úr bygdaráðnum, men har havi eg siti í nógv Harrans ár, og verið við til at gjørt nógv arbeiðir, bæði nýgerðir og ábøtir, sum kommunan fekk studning til otg tí kundi gera. Okkum nýtist ikki nakra frágreiðing um hesa studningsfríu skipan, tað er bara at fara út fyri dyr, so síggja vit hvussu vorðið er. Eingin nýgerð av nøkrum slag, einki verður viðlíkahildi í nakrari bygd. Tað er harmuligt at sígga, vegir sum vóru asfalteraðir fyri árum síðan eru nú so nógv slitnir, at teir skuldu veri asfalteraðir av nýggjum, og verða teir ikki tað, verður skjótt ikki koyrandi eftir teimum.

Seta pengar av á hvørjum ári til fullveldi og gloyma alt annað, hvørjum endar tað við? Ja, tað er so galið, at bygdir eru um at skola út á sjógv, heldur enn at tær fáa hjálp, tað kann ikki verða rætt. Eitt afturat viðvíkjandi tí studningsskipan, ið var, hon var eitt gott íkast til heimamennirnar, sum sannuliga eru við til at skapa lív á bygdunum.

Tað verður tosað so nógv um, at flyta stovnar úr Havn út á bygdirnar fyri at menna bygdirnar, dugi ikki at síggja nakra bygdamenning í tí, ein stovnur við tveimum ella fýra fólkum ger hvørki frá ella til, hvat menning viðvíkur. Og um hann kemur so verður hann bert í einum stað og kanska tey fólkini, sum fylgja við hava bústað í heilt øðrum plássum.

Síggi at borgarstjórin í Skopun, Gerhard Lognberg, hevur grein í bløðunum um barnaskúlar, har er sama skili. Gamla studningsskipanin hon líggjaði bygdirnar. Vit vóru ónogd tá vit ikki fingu tað vit søktu um, men tá ári eftir kom, vóru vit ikki gloymdir. Skipanin skapti lív og trivnað, sum skal til. Vónandi koma ikki fullveldisfólk aftur til valdi aftaná vali, so at okkara ágóði fer til nyttu heldur enn til fullveldisfjas.

Fólkaflokkurin er ikki bert ein vinnuflokkur

Tummas Jacob J. á Løgmansbø
valevni fyri Fólkaflokkin í Vágum

Fólkaflokkurin er eisini til fyri tey eldru, tey veiku, tey við serligum tørvi og tey menningartarnaðu í samfelagi okkara.

Verður Fólkaflokkurin við í komandi samgongu, vil hann arbeiða fyri, at meira verður gjørt fyri tey eldru, tey veiku og tey við serligum tørvi í Vágum. Vit ásanna, at tað ikki er rætt, at t.d. børn við serligum tørvi, og ofta eisini familjur teirra, vera noydd at flyta av oynni um barninum og familjuni skal verða lagað livilig og virðilig kor. Teirra møguleikar til eitt gott lív skulu ikki vera treytaðir av hvar tey búgva. Fleiri tilboð eiga at verða í lokalsamfelagnum.

Hvat viðvíkur teimum eldru av okkara borgarum so standa eini 30 fólk á biðilista til ellisheim her í Vágum. Møguleikin fyri at byggja bústa til tey eldru eigur at verða kannaður og settur í verk, tá rætta loysnin er funnin.

Fólkaflokkurin vil í einari komandi samgongu m. a. virka fyri, at:

1) Byggja bústovn til fólk við serligum tørvi, herundir menningartarnað, og útvega fleiri tilboð til hesar borgarar. Her eru fleiri loysnir, t.d. Klaksvíksfyrimyndin, har heim fyri fólk, ið eru menningartarnað og fólk við autismu eru samskipað soleiðs, at rúm er fyri báðum bólkunum bæði fakliga og fysiskt. Tað vil siga, at tann serstaki tørvurin hjá tveimum bólkum av fólki við serligum tørvi verður nøktaður.

2) At kanna tørvin á eldrabústaðum í Vágoynni og fremja loysnina í verki.

Tín krossur til Fólkaflokkin er tí eitt ljós á leiðini móti betri korum hjá teimum eldru, teimum veiku og teimum við serligum tørvi, sum búgva í Vágum.

Pápasa dreingir og forkelaðir versynir

Jógvan í Løðuni

Um orðalagið, pápasa dreingir, er onkrum ókent, so hevur tað veruliga verið nýtt um synir – ið komnir til manns – ikki hava sett fót undir egið borð, men lítið á og livað av avrikum faðirs – uttan tó at fáa dygdir faðirs við sær.

Ikki mangir versynir munnu gifta seg við slíkum í hyggju.

Lesarin ger av um myndin er nýtilig í Føroyar/Danmark høpinum.

Keldan til nýhugsan, framburð og vøkstur er ein frí vinna

Høgni Mikkelsen
Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi

Tað nátturugivna og tað menniskjansliga tilfeingið er upphavið og tann grundleggjandi fyritreytin fyri at skapa framburð í samfelagnum. Eitt fjøllbroytt og vælvirkandi vinnulív er keldan ti, at ríkidømi verður fingið burturúr tilfeinginum.

Sambandsflokkurin vil geva vinnulívinum so góðar umstøður at mennast og vaksa sum gjørligt. Flokkurin hevur tað uppfatan, at tess fríari ræsur vinnan hevur at skipa síni egnu viðurskifti, tess betri verður hon før fyri undir egnari ábyrgd at gera tað ítasta fyri seg sjálva og harvið fyri samfelagið. Tí skal tað almenna mest møguligt halda seg burtur frá vinnulívinum og einans gera tær lógir og reglur, sum objektivt eru neyðugar fyri at regulera vinnuna við atliti at øðrum samfelagsáhugamálum.

Liberala hugsjón Sambandsfloksins er, at vinnulívið eigur at vera privat heldur enn alment. Privata vinnulívið stimbrar ábyrgdarkensluna og arbeiðshugin hjá einstaklinginum. Almennur stuðul til privat virkir avskeplar kappingina, fremur ineffektivitet og eggjar til skeivar ílogur.

At taka eina avgerð ber altíð við sær eitt krav um at taka ábyrgd. Tá ið tað almenna sigur seg vilja taka ábyrgd, merkir tað í roynd og veru, at eingin tekur ábyrgdina. Tí eigur einstaklinguirn sjálvur at sleppa at taka avgerðina. Ábyrgdarkensla og avgerðarættur eru hornasteinar í persónliga frælsinum og í einum frælsum vinnulívi.

Tað er umráðandi, at tað almenna gevur vinnulívinum tryggar, frælsar og einfaldar karmar at virka undir. Hesir karmar eiga ikki at verða broyttir í tíð og ótíð.

Ein vinna, sum ynskir at eggja til nýhugsan, framburð og vøkstur, leggur stóran dent á at geva sínum medarbeiðarum eitt gott arbeiðsumhvørvi, hon leggur dent á gott samstarv og gevur medarbeiðarunum ávirkan.